gult cyan magenta svart



# Summarmótin 2001

MÓTI

**Nógv eru tey, ið fylgja mótanum, ung sum eldri og skal ein fylgja við, rúka nakrar túsund krónur úr pengapunginum um árið tí mótin broytist hvørja árstíð**

Nú vit nærkast ljósari tíðum, hyggja vit upp á mótan fyri summari 2001.

Vit eru á veg aftur í 80'ini við rúkandi fer, tað er heilt vist. Tú kanst róliga leita tær tyllturriklæðið og elastikbeltið framm, um tú vilt fylgja mótanum í summar.

Sjálvt gularótsbuksurnar eru við sláa ígjøgnum aftur og ein av orsøkunum til hetta kann vera, at fjølmiðlarnir sum heild fokusera nógv upp á 80'ini t.d. við at endursenda Dallas og Dollars, hartil hevur ein nýggj útgáva av "Charlies Angels" júst gingið í biografum runt um í heiminum.

Um tú ert ein av teimum, ið hevur lova ongantíð aftur at fara í eitt tyllturriklæði ella eitt elastikbelti, nýtist tær tó ikki at fella í vónloysi. "Ymiskt er mansins tykki", er ivaleyst nakað, ið vit øll eru samd um. Innan móta eru eisini ymiskar leiðir, so eitt hvørt skuldi verið til hvønn smag.

Tey kønu siga at rákið gongur ímóti fýra typum, og er tað útfrá hesum fýra typum, at vertirnir til framsýningina hjá Copenhagen International Fashion Fair skulu fyrireika síni ískot til vár/summar.



### "Individuality"

Typa: Ein kvinna, ið veit hvat hon vil. Hon er sjálvsikkur, ovurfeminin og hvílir í sær sjálvum, samstundis er hon engagera í aromaterapi og tílíkum

Stílur: Akslastroppar, blondir, retroprint, stretch shiffon og tyll, lag á lag, løtt summarlig turriklæði, bleytt ruskinn, skógvar og sandalir við reim.

### "Identity"

Typa: Arbeiðið í garðinum er hennara stóra girnd. Henni dámar best eitt einfalt lív og nýtir sína frítið við at ganga og putla úti í garðinum. Hetta er kvinnan við teimum "grønu fingrunum", sum broytir sítt heim, til eitt grønt paradís.

Stílur: Lyklaorðini eru hentleiki og rørsla, strech og vanlig kovboyklæði er grundarlagi fyri jakkar, kjólar, buksur, joggingbuksur, bleytar blusur og bundnar troyggjur við sláðum belti.

### "Interactivity"

Typa: Hendan kvinnan krevur avbjóðandi og virkna frítíð. Kamping, gongutúrar og súkling eru hennara besta frítíðarítriv. Henni dámar væl at finna avbjóðingar, bæði kropsliga og andaliga við uttandura ítróttargreinum.

Stílur: Joggingdraktir til tað hentligu frítíðuna, vatnburturvísandi stoffir, hot pants, sólhattar, klassiskar strípur ella puntar er av týdningi í toppunum, undirklæðunum og kjólunum.

### "Independence"

Typa: Tann moderna, vanliga gentan hevur ein bleytan stíl. Henni dámar high — tech. Hon er upptikin av frammtíðini á himnaknøttinum og er íðin eftir at læra um tann seinasta tøknikunnan.

Stílur: Klassisk "skúlagenta", fyriklæðikjólar, bundnar troyggjur, prikkar, einfaldar blusur og toppar, kasjettur og net taskur.

### Stutt um vár og summar mótan

Mótin verður ráður. Frá síðum frakka til kovboyklæðir. Lágar taljur, langir stúlvar og stuttir jakkar, er í stuttum tað vit fara at síggja til várs og í summar. Hetta er ein blandingur av 80'unum og 50'unum.

Um vit vanligu føroyingar gera okkum far um mótan í París og New York er nakað annað. Veðurlagið, mentanin, frítíðarítrivini o.a. eru viðurskifti, ið ávirka mótaheimin. Mótin er jú ikki tann sami í Japan, USA og her heima í kuldanum hjá okkum.




gult cyan magenta svart












